Tíðindablaðið sosialurin Telefon 311820 Telefax 314720 Internetadressa: www.sosialurin.fo e–mail: post@sosialurin.fo

# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:** Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin:** Fleyr til gul av ymsum ættum og fyrrapartin yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin regn. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið fríggjadagin:** Lot til andøvsgul av eystri og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:** Fleyr til gul av landnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 14 stig.



# Nú verður Drelnes oljuhavn

*Tvøroyrar kommuna fer í dag at lata felagnum Danbor Service havnina á Drelnesi*

STEFAN Í SKORINI

Tvøroyrar kommuna hevur havt stórar ætlanir við havnini á Drelnesi í langa tíð, men eru ítøkiligar ætlanir lagdar.

Býráðið hevur viðtikið at lata Drelnes til oljuútgerðarhavn, og landsstýrið hevur góðtikið ætlaninar. Tað verður eitt dótturfelag hjá Maersk, sum eitur Danbor Service, ið avtala verður gjørd við, og Danbor fær forrætt til ein leigusáttmála av Drelnesi. Danbor Service hevur frammanundan eina stóra oljuútgerðarhavn í Esbjerg.

Felagið Nordserv skal standa fyri arbeiðnum at gera sjálva útgerðarhavnina.

Danbor Service eigur ein part av Nordserv, meðan tann føroyska partin av felagnum eigur Henrik Thomsen av Tvøroyri, sigur Dan Nielsen, býráðsformaður á Tvøroyri.

Dan Nielsen sigur eisini, at hetta er eitt stórt stig hjá kommununi at taka, og tey vænta sær nakað stórt av hesum samstarvinum.

Tvøroyrar kommuna fer framvegis at eiga havnina á Drelnesi, men hon verður leigað út til Nordserv.




Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer landsynning og grynnist. Lágtrýstið í landnyrðing úr Føroyum fer spakuliga norðureftir.




Lágtrýstið í landnyrðing úr Føroyum fer spakuliga vestureftir og brúgvalagið yvir Íslandi verður yvir Føroyum hóskvøldið. Tropiska ódnin „Alberto" er nú á 39N-38V og fer eystureftir.




**Hitalagið mált frá 14./08. kl 06[00]–15./08. kl 06[00]. Hitin í gjár: 11,3°C**
Minsti hiti máldur í august: **0,2°** Mesti hiti máldur í august: **22,0°**




Avfallið: 0,5 mm – **mált frá 14./08. kl 6[00]–15./08. kl 06[00]**
Avfallið higartil í august: 52,3 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 22 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannahavn | 20 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 28 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 26 |
| Madrid | 31 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 34 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 34 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 14 |
| New York | 20 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | 16 |
| Panama | – |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 12 |

## Vestfalskyrrindi

11. aug.: Mánin longst frá jørðini
15. aug.: Fullmáni
22. aug.: Seinna kvarter
27. aug.: Mánin næstur jørðini

Kelda: Skipalistin 2000

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 16. aug. | 08.00 | 20.17 | 07.00 | 19.17 | 07.15 | 19.32 | 10.00 | 22.17 | 11.00 | 23.17 | 06.15 | 18.32 | 05.15 | 17.32 | 08.15 | 20.32 | 09.15 | 21.32 | 07.45 | 20.02 | 09.00 | 21.17 |
| 17. aug. | 08.33 | 20.49 | 07.33 | 19.49 | 07.48 | 20.04 | 10.33 | 22.49 | 11.33 | 23.49 | 06.48 | 19.04 | 05.48 | 18.04 | 08.48 | 21.04 | 09.48 | 22.04 | 08.18 | 20.34 | 09.33 | 21.49 |
| 18. aug. | 09.07 | 21.23 | 08.07 | 20.23 | 08.22 | 20.38 | 11.07 | 23.23 | – | 12.07 | 07.22 | 19.38 | 06.22 | 18.38 | 09.22 | 21.38 | 10.22 | 22.38 | 08.52 | 21.08 | 10.07 | 22.23 |
| 19. aug. | 09.38 | 21.57 | 08.38 | 20.57 | 08.53 | 21.12 | 11.38 | 23.57 | 00.23 | 12.38 | 07.53 | 20.12 | 06.53 | 19.12 | 09.53 | 22.12 | 10.53 | 23.12 | 09.23 | 21.42 | 10.38 | 22.57 |

# Bátur á land í Nólsoy

*Ein bátur av Skálafjørðinum sigldi upp á Kirkjutanga í Nólsoy um vikuskiftið. Manningin skuldi á Ovastevnu*

SVEINUR TRÓNDARSON

Um vikuskiftið fekk løgreglan í Havn fráboðan um, at ein bátur var farin á land á Kirkjutanga í Nólsoy. Báturin, sum er ein alibátur av Skálafjørðinum, hevði bert fingið smávegis skaða og varð fingin av aftur í góðari tíð áðrenn tað fór at fjarða.

Vakthavandi á støðini í Havn greiðir frá, at teir úr Nólsoy hava fingið at vita, at menninir, sum í bátinum vóru, helst vóru ávirkaðir, men at tað enn ikki er staðfest.

Fóru tit ikki út til Nólsoyar?

– Nei, tað gjørdu vit ikki. Tað var so tíðliga á morgni og tá tað tekur tíð at fáa fatur á báti, valdu vit at lata vera við at fara. Tað hevði verið líkamikið, tí eg rokni ikki við at teir, sum sigldu bátin upp á land, høvdu staðið í Nólsoy og tikið ímóti endanum, sigur vakthavandi á støðini í Havn.

Annars leggur hann afturat, at tað verður arbeitt við málinum og tí skulu menninir, sum sigldu bátin upp á turt, ikki kenna seg tryggar.

sosialurin
www.sosialurin.fo

TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG




12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes